Kappingareftirlitið

Fuglafjarðar kommuna

Ennivegur 38

530 Fuglafjørður

J.nr. 17/00071

Tórshavn, 19.04.2017

# Uppskot til avgerð viðvíkjandi loðsbátatænastuvirksemi á Fuglafirði

## Innleiðing

Tann 9. desember 2016 fekk Kappingareftirlitið kunning um viðurskifti í sambandi við loðsbátatænastuvirksemi á Fuglafirði, ið møguliga er í stríð við kappingarlógina. Kappingareftirlitið er í hesum sambandi komið til ta niðurstøðu, at Fuglafjarðar kommuna fremur brot á § 12, stk. 1 í kappingarlógini við at favoriserað egna loðsbátatænastutilbúgving, og harvið avmarka møguleikarnar hjá øðrum loðsbátatænastufeløgum at virka á Fuglafirði.

Kappingareftirlitið mælir til, at Fuglafjarðar kommuna verður áløgd at skipa so fyri, at veitarar av loðsbátatænastum, ið halda fyrisett krøv í loðslógini og kunngerðum hennara, framyvir kunnu kappast á jøvnum føti á Fuglafirði.

Við hesum skrivi verður uppskot til avgerð send Fuglafjarðar kommunu til hoyringar, áðrenn endalig avgerð verður tikin í málinum, sbrt. § 7, stk. 3 í kunngerð nr. 8 frá 13. mars 2008 um starvs- og fundarskipan fyri Kappingarráðið.

## Loðslógin

Sambært § 4, stk. 1, í løgtingslóg nr. 143 frá 18. desember 2013 um havnaloðsing (loðslógin), eru kommunur loðsstøðir, og hava tær skyldu til at tryggja, at skip, sum er loðsskyldug, og skip, sum biðja um loðs, verða loðsað, tá ið tey skulu í ella úr einari havn í viðkomandi kommunu. Ásetingin áleggur kommununum eina veitingarskyldu, og kunnu brot á hesa skyldu revsast við bót, sbrt. § 19. Kommunur kunnu tó sbrt. § 4, stk. 2, gera avtalu við privatar um at útinna loðsingina, men frátekur hetta ikki kommununum ábyrgdina av at tryggja, at loðsingin fer fram samsvarandi lógini.

Loðslógin ásetir tó ikki nærri krøv hvussu loðsingin skal skipast, ella til valið av loðsbáti, annað enn, at hesin, sbrt. § 6, skal lúka galdandi krøv frá Sjóvinnustýrinum. Kommununum stendur sostatt frítt at velja, um tær ynskja at nýta egnan loðsbát ella um avtala skal gerast við privatar um at útinna loðsingina. Í hesum sambandi er einans avgerandi, at loðsingin verður veitt sambært lógini, og at loðsbáturin heldur fyrisett krøv. Kommunurnar hava tó, sbrt. kunngerð nr. 153 frá 21. desember 2012 um loðsing, gjøld

o.a., eina skyldu til at veita loðsing til viðkomandi skip, innan nærri ásettar freistir, sí §§ 3 og 4 í kunngerðini.

**Kappingarviðurskifti**

Hóast loðslógin heimilar kommunum at gera avtalur við privatar um at útinna loðsingina, so metir Kappingareftirlitið hinvegin, at tað kann skeikla kappingarstøðuna millum veitarar av loðsbátatænastum um kommunur velja at favoriserað egna loðsbátatænastutilbúgving, og harvið avmarka møguleikar hjá øðrum veitarum at virka í teimum havnum, ið kommunurnar varða av.

Sambært upplýsingum, ið Kappingareftirlitið hevur fingið innlit í, so avgjørdi Fuglafjarðar kommuna á býráðsfundi hin 27. november 2014 at samtykkja avgerðina hjá vinnunevndini í Fuglafjarðar kommunu hin 14. apríl 2014, har nevndin avgjørdi at: *"biðja havnarmeistaran um at skipa so fyri, at "Pilot" verður fyrsta val til loðs- og oljusperrutænastu"* á Fuglafirði. Kappingareftirlitið skilir, at Fuglafjarðar kommuna grundar avgerð sína á, at loðsbáturin M/S Pilot, ið Sp/f Pilot eigur, hevur fasta støð í Fuglafirði, og tí altíð er til taks, tá loðsur skal siglast út ella heintast.

Sambært teimum upplýsingum, ið Kappingareftirlitið hevur fingið innlit í, so hevur avgerðin hjá Fuglafjarðar kommunu havt við sær, at onnur loðsbátatænastufeløg ikki verða biðin um at greiða loðsbátatænastu á Fuglafirði. Sjálvt í teimum førum har hesi feløg har virka sum agentar/umboðsmenn fyri skip, og hava skulu staðið fyri allari sleipi- og loðsbátaavgreiðslu á Fuglafirði, hava feløgini verið tvungin til at nýta lokala loðsbátatænastufelagið, hóast loðsbátur hjá feløgunum, ið lúkur øll krøv, hevur verið á staðnum.

Sambært § 12, stk. 1 í løgtingslóg nr. 35 frá 3. mai 2007 um kapping (kappingarlógin), kann Kappingarráðið geva boð um, at almennur stuðul til fyrimuns fyri ávíst vinnuvirksemi skal støðga ella afturrindast. Sbrt. § 12, stk. 2, kunnu boð eftir stk. 1 gevast tá stuðulin: 1) beinleiðis ella óbeinleiðis hevur til endamáls ella sum avleiðing at avlaga kappingina, og 2) ikki er lógligur sambært almennari regulering. Harumframt skal stuðulin vera úrveljandi (selektivur), ið merkir, at stuðulin bert verður veittur ávísum/ari vinnufyritøku. Stuðulshugtakið í § 12 fevnir breitt, og viðvíkur einhvønn beinleiðis ella óbeinleiðis stuðul, ið gevur móttakandi fyritøku ein fíggjarligan fyrimun, ið hon ikki vildi fingið undir vanligum marknaðarumstøðum.

Avgerð, um veittur stuðul er lógligur sambært almennari regulering verður tó tikin av avvarðandi landsstýrismanni, ávikavist av avvarðandi kommunala eftirlitismyndugleikanum, er annað ikki ásett í aðrari lóggávu, sbrt. § 12, stk. 3 í kappingarlógini.

**§ 12, stk. 2, nr. 1 í kappingarlógini**

Sambært § 12, stk. 2, kunnu boð eftir § 12, stk. 1 gevast tá stuðulin beinleiðis ella óbeinleiðis hevur til endamáls ella sum avleiðing at avlaga kappingina. Kappingareftirlitið metir ikki, at loðslógin gevur kommunum í Føroyum serstaka heimild til at favoriserað egna loðsbátatænastutilbúgving, og harvið avmarka møguleikar hjá øðrum veitarum at virka í teimum havnum, ið kommunurnar varða av. Kappingareftirlitið metir, at tillutaði framíhjárættur í viðkomandi málið er selektivur, og gevur móttakandi fyritøku ein fíggjarligan fyrimun, ið hon ikki vildi fingið undir vanligum

marknaðarumstøðum. Kappingareftirlitið metir harumframt, at tillutaði framíhjárætturin hevur við sær, at onnur loðsbátatænastufeløg verða avskorin frá at bjóða hesa tænastu á eini av mest traffikeraðu vinnuhavn í Føroyum. Kappingareftirlitið metir tiskil, at býráðssamtyktin hjá Fuglafjarðar kommunu hin 27. novembur 2014, har samtykt varð at: *"biðja havnarmeistaran um at skipa so fyri, at 'Pilot" verður fyrsta val til loðs- og oljusperrutænastu"* hevur ein kappingaravlagandi virknað, ið kann skaða kappingarneytar eins væl og brúkarar av loðsbátatænastum á Fuglafirði.

**§ 12, stk. 2, nr. 2 í kappingarlógini**

Av teirri orsøk, at avgerð, um veittur stuðul er lógligur sambært almennari regulering verður tikin av avvarðandi landsstýrismanni, sbrt. § 12, stk. 3 í kappingarlógini, sendi Kappingareftirlitið landsstýrismanninum í uttanríkis- og vinnumálum, hin 30. mars 2017, ein skrivligan fyrispurning, har spurt millum annað varð um ásetingar eru í loðslógini, ið seta kappingarlógina til viks.

Í svarskrivi frá uttanríkis- og vinnumálaráðnum hin 5. apríl 2017 stendur greitt, at kommunur, ið sambandi við útveitan av loðs- og loðsbátatænastuvirksemi skulu ansa eftir, at vanligu reglurnar í kappingarlógini verða yvirhildnar. Í svarskrivinum ger uttanríkis- og vinnumálaráðið somuleiðis greitt, at tað viðvíkjandi loðsbátavirksemi ikki eru ásetingar í loðslógini, ið seta kappingarlógina til viks.

## Niðurstøða

Kappingareftirltið metir, at Fuglafjarðar kommuna á býráðsfundi hin 27. novembur 2014, har avgjørt varð at staðfesta avgerðina hjá vinnunevndini í Fuglafjarðar kommunu, hin 14. apríl 2014, har vinnunevndini avgjørdi at: *"biðja havnarmeistaran um at skipa so fyri, at "Pilot" verður fyrsta val til loðs- og oljusperrutænastu"*, fremur brot á § 12, stk. 1 í kappingarlógini, tí kommunan við at favorserað egna loðstænastutilbúgving avmarkar møguleikar hjá øðrum loðsbátatænastuveitarum at virka á Fuglafirði.

Kappingareftirlitið vil tí áleggja Fuglafjarðar kommunu um at skipa so fyri, at veitarar av loðsbátatænastum framyvir kunnu kappast á jøvum foti á Fuglafirði. Kappingareftirlitið hugsar serstakliga um tær støður, har agentar/umboðsmenn, ið umboða loðsskyldug skip, ikki skulu verða forðaðir í at nýta egnar loðsbátar til at seta loðsin á ta loðskylduga skipið, og at taka hann av skipinum aftur, tá loðsbátatænastan er veitt. Hetta treytar sjálvtsagt, at viðkomandi loðsbátur er góðkendur av Sjóvinnustýrinum og megnar at yvirhalda ásettu freistirnar, sbrt. §§ 3 og 4 í kunngerð nr. 153 frá 21. desember 2012.

## Hoyring

*Hoyringsfreist er sett til 2 vikur við móttøku av hesum brævi. Viðmerkingar kunnu sendast Kappingareftirlitinum á: Kappingareftirlitið, Skálatrøð 20, P. O. Box 73, FO-110 Tórshavn, ella á kapping@kapping.fo*

*Hjálagt er fyrispurningur sendur uttanríkis- og vinnumálaráðnum hin 30. mars. 2017, umframt svar frá uttanríkis- og vinnumálaráðnum hesum viðvíkjandi hin. 5. apríl 2017.*

Kappingareftirlitið

Vegna

Kappingareftirlitið

Terje Sigurðsson

Deildarstjóri

Rúni J. Niclassen

Fulltrúi